VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Knýta Føroyar saman

Í blaðnum í gjár greiddi Christian Andreasen í Mikladali frá eini ætlan um at gera ein undirsjóvartunnil í Kalsoynna. Fyri nógv ljóðar hetta uttan iva sum eitt ørvitisprojekt, og tað kann tað kanska tykjast.

Talan er um sera nógvar pengar, tá vit tosa um undirsjóvartunlar, men tað hevði tó verið áhugavert at sæð eina ætlan, sum kann binda so at siga allar Føroyar saman – annaðhvørt við tunlum, brúm ella byrgingnum.

Mikladalsmaðurin greiddi frá, at her er talan um eina ætlan, sum liggur langt frammi í tíðini – og at tey heldur vilja leggja pengar til viks til tunnil, enn at byggja nýtt skip til kalsoyarsiglingina.

Sjálvandi liggur hetta langt frammi í tíðini, og orrustan um Sandoyartunnilin, sum serliga Gerhard Lognberg hevur verið eksponentur fyri, hevur uttan iva forkomið ætlanini um Sandoyartunnilin í nógv tey næstu árini – men vit eiga tó at leggja ætlanir, sum kunnu gjøgnumførast við tíðini. Hvar Skálafjarðartunnilin er endaður, er sera ógreitt í hesum døgum, men mangt bendir á, at tann ætlanin heldur fram eftir upprunaliga leistinum.

Vit hava í dag 17 tunlar í Føroyum. Tey vóru helst fá, sum ímyndaðu sær fyrst í sekstiárunum, at Føroya land og Føroya firðir skuldu verða so nógv útborað sløk fimmti ár seinni, men tað er kortini veruleikin, og tí eiga vit eisini at leggja ætlanir tey næstu fimmti árini.

Og her er tað, at vit eiga at hugsa um, hvussu vit ikki bert kunnu binda meginøkið saman, men eisini útjaðaran.

At knýta allar Føroyar saman er helst eitt høgt mál at seta sær, men framtíðar føroyingurin fer uttan iva bert at búleikast har, sum ferðandi er uttan at fara í bát. Ein framtíðar samferðsluætlan eigur tú at verða gjørd við cost-benefit útrokningum, har fast samband verður millum øll øki í landinum – og so kann raðfestast út frá tíð. Kanska øll økini verða bundin saman, tá løgtingið fyllir 200 ár í 2052. Livst so spyrtst...

Sosialurin

Fólkapensiónin

FINNUR JOHANSEN

Fyrr í summar skrivaði eg nakað um, at fólkapensiónin eigur at verða regulerað sum lønin hjá øðrum bólkum í samfelagnum. Tað, eg vildi við míni skriving, var at gera vart við tann skeivleika, at pensiónin ikki verður hækkað í tráð við prísvøksturin í samfelagnum. Fakfeløgini vísa á, at inntøkan hjá lønmóttakarunum eigur at hækka samsvarandi prísvøksturinum, men prísvøksturin rakar eisini pensionistarnar.

Hóast reaktiónin ikki var stór, høvdu landsstýrismaðurin og landsfelagið hjá pensionistunum nakað at siga, men tá formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum er undantikin, var so eiðasørt, at nakar av flokkunum latst um vón. Tá ið tú nertir við eitt so viðbrekið mál, sum fólkapensiónina, er altíð vandi fyri at tú vakir onkran, tú ikki ætlaði, og soleiðis var eisini hesu ferð.

Sjálvstýrisformaðurin kom við síni ætlan, um hvussu vandamálið við fólkapensiónini skuldi loysast. Hann vildi hava at pensiónin skuldi javnast út, soleiðis at takast skal frá teimum ríku pensionistunum og givið teimum fátøku. Her má eg siga sjálvstýrisformanninum, at tað eru eingir ríkir fólkapensionistar, tá kvotafólkið er undantikið sjálvandi.

Hví ikki heldur virka fyri at tann parturin av figgjarlógini, ið er avsettur til pensiónir gerst størri enn hann er. Inntøkurnar hjá landskassanum skulu verða býttar øðrvísi, soleiðis at tikið verður burturav øðrum økjum, eitt nú av prestigeprojektum og studningum til heilar og hálvar millionerar. Umframt at pensionistarnir vera við í býtinum av upphæddini, sum verður settur av til lønarhækkingar. Tað eru hóast alt vit, ið hava bygt hetta samfelagið.

Verður grundupphæddin hjá pensionistunum hækkað við 1000 krónum um mánaðin, vilja meirútreiðslurnar hjá landskassanum til pensiónir verða einar 70 milliónir árliga. Hetta siga landsstýrið og tingið seg ikki hava ráð til, samstundis sum talað verður um at gera tunnlar fyri milliardir. Alt gott um tunnlar og stásiligar ferjur, men tá vit nú hesi seinastu árini hava brúkt milliardir til samferðslukervið, eiga onnur øki tørn. Ikki minst eiga pensiónurnar at verða reguleraðar, og gift pør javnstillað við ikki gift pør. Samlaðu útreiðslur landskassans til tær her nevndi reguleringar av fólkapensiónini eru minni enn útreiðslurnar við yvirtøkuna av serforsorgini.

Framtíðarútlitini siga, at tað verða fleiri pensionistar og færri í arbeiðsførum aldri at gjalda pensiónina. Heldur enn at hava ætlanir um at taka frá ávísum pensionistum, átti sjálvstýrisformaðurin og hinir politikaranir at virka fyri eini nýggjari pensiónsskipan, sum er grundað á uppsparing hjá tí einstaka. Tað hevði lætt um hjá landskassanum, og ikki minst framt eina uppsparing, sum samfelagið hevur so harðliga fyri neyðni. Men tað fer at taka eitt mannaminni áðrenn ein tílík skipan fer at virka, tí er umráðandi sum skjótast at farið verður undir at gera eina nýggja skipan, har hvør einstakur sparir upp til sína pensión. Til tað tíð mugu vit halda okkum til fólkapensiónsskipanina og útbyggja hana.

Ger tína skyldu og krev tín rætt

EVALD SÓLVITSSON

Soleiðis agiteradi Jógvan Adolf í 90-unum.

Sandoyingar hava gjørt sína skyldu, men hava verið sera smædnir at kravt sín rætt.

Nú vit endiliga hava rætt ryggin og kravt ogara rætt, verða vit gjørd til grenj og útreiðsluneyt.

Tað bleiv boðað frá hart og týðiliga, at eftir Vágar og Norðoyggjar átti Sandoyggin tørn.

Tað bleiv bara ikki hugsað um, hvussu skuldi farast í gongd, ei heldur hvussu skuldi figgjast.

Var tað tí at polittikararnir ikki høvdu evnir ella vilja til tað?? - ella var tað tí, at teir ongantíð høvdu ætlað, at vit skuldu fáa ein tunnil, men bert atkvøðufiskarí fyri møguliga at fáa tingmann úr oynni.

Havið lagt til merkis, at eftir at meiriluti fekst fyri einum valdømi kølnaði áhugin fyri Sandoyar tunnilinum.

Gamaní. Ein lóg bleiv samtykt við ongum pengum, helst meira tí brúk varð fyri øllum atkvøðum hjá táverandi samgongu, og kanska kyrra nakrar ótolnar veljarar úr Sandoyar sýslu.

Havi eisini lagt til merkis, at eittans ein polittikari hevur lagt fram alment, hvussu tunnilin kann figgjast, og er tað Sandoyar tingmaðurin Páll á Reynatúgvu, og gjørdi hann tað longu í 2004. Tann loysnin hann borðreiddi við tá, líkist nógv tí semju sum nú liggur á borðinum.

Um hon ber á mál kemur tíðin at vísa. Takið einki fyri givið - allar hugsandi roynd-ir hava verið gjørdar undan og aftaná valgið at traðka Páll til síðis - enn hevur tað ikki eydnast.

Javnaðarflókkurin hevur traðkað Gerhard út - sama mann sum teir fóru eftur, tí teir fyri ein hvønn prís vildu vinna sær mann úr Sandoynni - tað vóru 7 valdømir - nú er bert eitt, so kanska halda teir seg ikki hava brúk fyri okkum longur.

Havi sjálvur verið fyri at Føroyar bleiv eitt valdømi, bert synd at tað hendi í eini tíð vid so nógvum breyðpolittikarum á tingi, sum hava tveitt allar hugsjónir fyri borð.

Í ræðslu fyri sínum egna politiska búki lesa teir meiningakanningar í fjølmiðlunum og taka so meining út frá tíð, hava ikki dirvi at gera nakað annað, tora ikki at taka kampin upp við fjølmilafólkini, men lata teir seta dagsskánna.

Tosað verður um møguliga kreppu í Føroyum, ella búskaparliga afturgongd - um so verður ivist eg í, um vit koma at merkja nakað til tað í Sandoyar Sýslu.

Man má fyrst hava havt framgongd, fyri at merkja afturgongd.

Allar kreppur í Føroyum (størri ella minni), eru komnar aftan á at bankarnir vilt hava figgjað eina rød av ørvitisprojektum í høvuðstaðnum - projekt sum ikki skapa búskaparligan framburð, men bert eru útreiðslutyngjandi, og tað skulu so vit gjalda fyri, eisini í Sandoynni uttan at fáa nakað afturfyri, enn at vera kalla grenj og útreiðslupostar.

Vit í Sandoyar sýslu fara hóast alt framhaldandi at gera ogara skyldu - og krevja ogara rætt, uttan at traðka á onnur fyri at koma fram um.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.